umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

Løgmansskrivstovan
Tinganes
100 Tórshavn

Argir, 14. november 2025
Málsnr.: 25/29457
Tykkara málsnr.: 25/26836
Málsviðgeri: HD

Hoyringarsvar frá Umhvørvisstovuni til uppskot til Løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum (Fyrireiking, prosjektering og útboð)

Umhvørvisstovan, sum er náttúru- og umhvørvismyndugleiki, hevur hesar viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum (Fyrireiking, prosjektering og útboð).

Sum framhald av hoyringarsvari frá 13. desember 2024[1] og viðmerkingar frá 13. mai 2025[2] mælir Umhvørvisstovan til, at ein innleiðandi og yvirskipað meting av árinum á náttúru av alternativum loysnum verður gjørd, *áðrenn* støða verður tikin til linjuføring (t.e. ein strategisk árinsmeting). Ein árinsmeting á einum strategiskum stigi er ein innleiðandi kanning, sum tekur støði í tøkari vitan, áðrenn gjørdar verða ítøkiligar kanningar og metingar av valdari linjuføring.

Umhvørvisstovan metir, at tað er av stórum týdningi, at tikin verða øll møgulig atlit til tey náttúruvirðini, sum eru í og nærhendis ætlaða verkætlanarøkinum. Umhvørvisstovan hevur tvey mál um økisvernd sambært náttúruverndarlógini í ætlaða verkætlanarøkinum: Skúgvoy og øki á Sandi, sum fevnir um Søltuvík, Mølheyggjarnir Heima á Sandi, Gróthúsvatn, Sandsvatn, Stóravatn og Lítlavatn. Í báðum førum er støða ikki tikin til mark og verndarflokk.

Harumframt kunnu vera økir í Suðuroynni, sum hava serlig náttúruvirðir, ið kunnu verða ávirkaði av hesi verkætlan, eitt nú Norðbergsvatn og Heygsvatn í Hvalba.

Náttúruverndarlógin er nýggj, og tí er tilgongdin at verja økir við serligum náttúruvirðum júst byrjað. Umhvørvisstovan er í holt við at skráseta og kortleggja økir í Føroyum, sum eiga at verða vard, men náttúruskrásetingarnar eru fragmenteraðar, og tí er vitanin um náttúru avmarkað.

Í serligu viðmerkingunum til § 3, stk. 1, nr. 1, stendur, at endaliga vegaføringin skal gerast í samráð við Sands kommunustýri. Fyri at tryggja verndarvirðini í verkætlanarøkinum ynskir Umhvørvisstovan at verða partur av hesari tilgongd.

[1]Hoyringarsvar frá Umhvørvisstovuni til uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum.
[2] Viðmerkingar frá Umhvørvisstovuni um atlit at náttúru og umhvørvi í sambandi við møguligan tunnil til Skúvoyar.

umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

At enda mælir Umhvørvisstovan til, at hesar broytingar verða gjørdar til ásetingina í § 8, stk. 5, har tað, sum verður lagt afturat, stendur við *skráskrift*, og tað sum dettur burtur, er ~~gjøgnumstrikað~~:

> "*Verkætlanin* ~~Undirsjóvartunnil~~ sbrt. § 3~~, nr. 4~~ krevur loyvi sbrt. § 2*8~~6, stk. 1~~* í umhvørvisverndarlógini."

Umhvørvisstovan vil fegin svara spurningum og ivamálum. Vinarliga setið tykkum í samband við okkum, um tit hava tørv á fleiri upplýsingum ella nágreiniligum viðmerkingum.

Vinarligar heilsanir

Sigga Jacobsen
Deildarleiðari, Vernd